# Tað var hansara simpla starvsplikt at handla skjótt

*– Hevði Jákup Mørkøre ikki borið so skjótt at, hevði tað verið neyðugt at sagt enn fleiri fólkum á Landssjúkrahúsinum upp. Tí var tað hansara simpla starvsplikt at handla skjótt, sigur sakførarin hjá Jákupi Mørkøre*



*– Yvirhøvur má tað sigast at vera sera ivingarsamt, og í stríð við andan í tí livandi fólkaræðinum, at geva almennum leiðarum munnkurv, sigur Sigmund Poulsen*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Tað var ein sera týdningarmikil uppgáva hjá Jákupi Mørkøre, sum leiðara fyri Landsjúkrahúsið at syrgja fyri, at fíggjarætlanin fyri stovnin heldur.

– Ger hon ikki tað, er tað eyðsæð, at tað hevði fingið avleiðingar fyri hann.

Sigur Sigmund Poulsen, sakførari hjá Jákupi Mørkøre, sum nú er koyrdur frá sum leiðari fyri Landssjúkrahúsi.

Í einum drúgvum brævi til Helenu Dam á Neystabø, roynir hann at gjøgnumholað grundgevingarnar hjá landsstýrismanninum fyri at siga Jákupi Mørkøre upp.

Grundgevingarnar fyri at siga sjúkrahúsleiðaran upp, kunnu samanfatast í trý punkt:

1: Hann hevði onga orsøk til at boða frá so nógvum uppsagnum, sum hann gjørdi.

2: Hann dugdi ikki nóg væl at samskifta við starvsfólk, álitisfólk, fakfeløg og samstarvsfelagar annars.

3: Hann vísti ikki tað neyðuga lýdni og tann neyðuga loyalitetin mótvegis politisku skipanini, sum hann starvaðist undir.

Øllum hesum grundgevingunum roynir sakførarin at vísa aftur í brævinum til Helenu Dam á Neystabø.

## Gjørdi sína fremstu skyldu

Viðvíkjandi punkti 1, sigur Helena Dam á Neystabø, at í fjølmiðlunum í oktober í fjør hevði jákup Mørkøre boðað frá 40-50 uppsagnum á Landssjúkrahúsinum, uttan at vita, hvussu stór játtanin á fíggjarlógini fór at vera.

Men Sigmund Poulsen vísir á, at hetta passar ikki.

Tí 1. oktober í fjør fekk Jákup Mørkøre bræv frá Mary í Garði, fíggjarstjóra á almanna og heilsumálastýrinum, har hon biðjur sjúkrahúsleiðaran gera eina fíggjarætlan fyri Landssjúkrahúsið útfrá uppskotinum til fíggjarlóg, sum tá varð lagt fyri tingið.

– Og tað, sum Jákup Mørkøre fortaldi fyri fjølmiðlunum, var avleiðingin av fíggjarætlanini, sum almanna og heilsumálastýrið hevði álagt honum at gera.

Sigmund Poulsen sigur, at tað er kanska týdningarmesta uppgávan hjá Jákupi Mørkøre at syrgja fyri, at fíggjarætlanin heldur.

– Og tað er hansara simpla starvsplikt at handla skjótt. Tí gjørdi hann sær beinanvegin nágreiniliga tankar um, hvat var neyðugt at gera og, hvat hetta fór at bera við sær.

– At hann brúkti sín sjálvsagda rætt, og kanska enntá sína sjálvsøgdu plikt at fortelja alment, hvat møguliga var neyðugt at gera, var kanska hansara „brotsverk“, leggur sakførarin afturat.

Hann sigur, at tað er heldur ikki rætt, at Jákup Mørkøre ikki hevur kunnað starvsfólk og avvarðandi myndugleika frá hesum.

– Tað kann ikki vera meiningin, at hann skal boða hvørjum einstøkum starvsfólki frá.

– Og almanna og heilsumálastýrið varð kunnað um ætlanina, enntá skrivliga í brævi tann 12. oktober. Í brævinum nevnir Jákup Mørkøre eisini beinleiðis, at tað verður neyðugt at siga 40-50 fólkum upp. Hendan sparing er endurtikin á leiðslufundi 13. oktober.

Í brævinum sigur Jákup Mørkøre, at eftir ætlaðu játtanini til Landssjúkrahúsið, skulu 84% av samlaðu játtanini brúkast til lønir. Og tað er so nógv, at tað kann ikki halda fram.

Løknafrøðin vinnur skjótt fram og tað merkir, at nýggj tól skulu keypast, umframt nýggjur, dýrur heilivágur.

Somuleiðis hevur starvsfólkið krav uppá eftirútbúgving, sum tey ikki fáa nú. Eisini á telduøkinum er Landssjúkrahúsið eftirbátur.

Tá ið tað ikki ber til at fáa eykajáttan, er Landssjúkrahúsið tí komið til ta niðurstøðu at 10 milliónir mugu yvirførast frá lønarjáttanini til rakstrarjáttanina.

Hetta merkir samanumtikið, at 40-50 fólk skulu sigast upp.

Í einum aftursvarið 18. oktober, sigur Almanna og heilsumálastýrið, at tað er eitt viðkvæmt mál at siga 40-50 fólkum upp og at tað tí er neyðugt at málið fær tað neyðugu, politisku viðgerðina.

Í sama brævi heitir Helena Dam á Neystabø á Jákup Mørkøre um ikki aftur at fara í fjølmiðlarnar við einum slíkum máli, tí tað órógvar tað politisku viðgerðina.

– Hetta tók Jákup Mørkøre sum eitt forboð fyri at úttala seg. Og hann hevur heldur ikki úttalað seg til fjølmiðlarnar um sparingar síðani tá.

Sakførarin skoytir uppí, at tað eru eisini almennir leiðarar, sum hava úttalað seg til fjølmiðlarnar, áðrenn fíggjarlógin er endaliga samtykt.

– Men yvirhøvur má tað eisini sigast at vera sera ivingarsamt, og í stríð við andan í tí livandi fólkaræðinum, at geva almennum leiðarum munnkurv.

Viðmerkjast skal, at á leiðslufundi á Landssjúkrahúsinum 16. november í fjør, greiddi Jákup Mørkøre frá, at hann fór at biðja um eina eykajáttan í ár uppá 1,8 millión til edv útgerð.

Men eina viku seinni, tann 25, november, fær hann skrivliga at vita frá aðalstjóranum í almanna og heilsumálaráðnum, Høgna Joensen, at hann skal reka sjúkrahúsið innanfyri teir karmar, sum politiski myndugleikin áleggur honum.

– Tað tilkemur ikki tygum at søkja um eykajáttan, bara tí at tygum halda, at tygum kunnu brúka fleiri pengar.

– Tað verður mett sum tekin uppá manglandi loyalitet yvirfyri politiska myndugleikanum, at tygum boða frá, at tygum ætla at søkja um eykajáttan, sigur Høgni Joensen m.a. í brævinum til Høgna Joensen.

## Fekk greið boð

Ein atfinning, sum Helena Dam á Neystabø nevnir í uppsagnarbrævinum til Jákup Mørkøre, er, at hann ætlaði at siga 27 fólkum upp, uttan at hava grundgevingar fyri meiri enn 10.

Men heldur ikki hetta vil Jákup Mørkøre góðtaka.

– Í fundarfrágreiðingini frá leiðslufundinum tann 5. januar, sum almanna- og heilsumálastýrið hevur góðkent, verður staðfest, at játtanin til lønir er 1,6 milliónir lægri í 2000 enn hon skuldi vera fyri at varðveita støðið eftir lønarhækkingarnar í fjør. Harafturat mangla 1,6 millión til nýggjan læknastjóra og røktarfakliga stjóran eftir nýggja leiðslubygnaðinum. Og at enda høvdu tær ymsu deildirnar 3,7 milliónir í halli frá í fjør við sær, sum eisini skulu sparast innaftur í ár, ella kanska yvir eini tvey ár.

Ymsir møguleikar fyri sparingum hava verið nevndir.

– Men í hvussu er fekk Jákup Mørkøre greið boð frá Høgna Joensen, aðalstjóra, um, at hann undir øllum umstøðum skuldi spara minst tríggjar milliónir. Hetta kann prógv førast fyri, sigur Sigmund Poulsen.

Hann sigur, at rokna vit við eini miðal ársløn uppá 250.000 krónur, og at tað tekur eitt hálvt ár at fáa fólk úr starvi, tey hava uppsagnartíð og hoyringsfreist, gevur hetta umleið 27 uppsagnir.

– So her hevur Jákup Mørkøre onki gjørt enn tað, sum hann beinleiðis varð biðin um at gera. Og tí kann tað heldur ikki vera talan um óloyalitet og ólýdni mótvegis politisku skipanini.

Og sjálvur aðalstjórin hevur eisini boðað sjúkrahúsleiðaranum frá, at Helena Dam á Neystabø varð væl kunnað um hetta.

Sakførarin sigur, at í fundarfreiðreiðingini frá leiðslufundi 12. januar, var tað endurtikið, at neyðugt var við 27 uppsagnum

– Fylgisskjalið til hesa frágreiðingina hevur fíggjardeildin á almanna og heilsumálastýrinum gjørt, hóast tað er skrivað á pappír við brævhøvdinum hjá fyrisitingini á Landssjúkrahúsinum á.

Í fylgisskjalinum verður boðað frá, at sparast skulu góðar tríggjar milliónir í lønum. Um øll sparingin skal fremjast í ár, verður talan um 26 størv.

Skal øll sparingin ikki verða sett í verk fyrrenn komandi ár, verður talan um færri uppsagnir.

Men tann seinna loysnin er tó treytað av, at allur peningurin ikki verður brúktur til nýggja leiðslubygnaðin og til játtað størv í 1999, sigur fíggjardeildin.

Jákup Mørkøre skilir tí ikki, hví Helena Dam á Neystabø kemur eftir, at grundgevingar eru ikki fyri fleiri enn 10 uppsagnum.

Møguliga verður tað gjørt við at flyta imillum ymsar konti. Men hetta er beinleiðis at leggja seg út í arbeiðið hjá leiðaranum.

Og so ger hann eisini vart við, at er hetta so, er tað eftir øllum at døma fíggjardeildin á almanna og heilsumálaráðnum, sum hevur víst landsstýrismanninum á eina nýggja uppstilling.

Men hetta er sama fíggjardeild, sum nakrar fáar dagar frammanundan gjørdi Jákup Mørkøre greitt, hvat hann skuldi gera.

## ógreitt

Annars vísir sakførarin á, at nógv viðurskifti eru rættiliga ógreið. Eitt nú eru summi brøv frá fíggjardeildini á almanna og heilsumálastýrinum skrivað á brævpappír hjá fyrisitingini á Landssjúkrahúsinum.

Somuleiðis hevur aðalstjórin, Høgni Joensen, bara í einstøkum førum medundirskriva brøv frá Helenu Dam á Neystabø til Jákup Mørkøre, sigur sakførarin.




*DONG er millum oljufeløgini sum vísa bæði arbeiða í Føroyum og Grønlandi*

# Føroyingar í størv sum trainees hjá DONG

JAN MÜLLER

Tað er alt meira vanligt, at útlendsk oljufeløg taka føroyingar í arbeiði sum eitt nú trainees. Hetta hevur m.a. sermerkt oljufeløgini í „Faroes Partnership“ bólkinum við Amerada Hess, Dong, Lasmo, Norsk Hydro og Atlantic Petroleum. Herfyri hevði danska olju- og gassfelagið DONG lýsingar í bløðunum, har søkt varð eftir føroyingum til sokallað „trainees“ størv.

Felagið sigur í einum tíðindaskrivi, at fýra føroyingar aftrat fara at arbeiða sum traniees hjá DONG (Dansk Olie og Naturgas). Har skulu teir læra meira um olju- og gassyrkið. Teir fýra skulu arbeiða á høvuðsskrivstovuni hjá DONG í Hørsholm uttan fyri Keypmannahavn í upp til tríggjar og seks mánaðir.

Søren Gath Hansen, stjóri í DONG sigur seg vera sera væl nøgdan við teir føroyingar, sum longu hava verið í traineesstarvi hjá felagnum. -Teir fyrstu føroyingarnir vóru her hjá okkum í 1988 og 99, og hetta haldi eg var sera væleydnað bæði fyri teir og okkum. Tískil síggja vit fegnir, at aðrir føroyingar fáa hetta høvið. Ikki minst tí at vit á tann hátt eru við til at hjálpa Føroyum við at byggja upp vitan og kompetansu innan oljuídnaðin og fyrisiting.

Teir fýra føroyingarnir, sum skulu til arbeiðis hjá DONG eru Jens Wang, juristur, Sólva Eliasén, geofysikari, Iri K. Petersen, geofysikari og Regin Joensen, ið lesur til reservoirverkfrøðing.

Á oljuframsýningini í Stavanger seinast, gjørdi DONG nógv burturúr at greiða frá arbeiðinum í Grønlandi. Næstu ferð DONG verður á framsýning fara Føroyar uttan iva at fáa størri lut á básinum hjá DONG. Við at seta føroyingar í traineesstørv vil DONG vísa sín stóra áhuga fyri eini føroyskari luttøku í oljuvinnuni



# Ráðiligt at brúka fleiri pengar

*Formaður í Búskaparráðnum heldur ongan vanda vera á ferð, fyri tað um fleiri pengar á fíggjarlógini verða brúktir til at loysa kreppustøðuna á Strandferðluni*



EYÐUN KLAKSTEIN

Verða pengarnir til at loysa trupulleikarnar á Strandferðsluni brúktir í útlandinum, hevur hetta ongar álvarsligar fylgjur við sær fyri føroyska búskapin.

Hetta sigur Bjarni Olsen, formaður í Búskaparráðnum, nú Strandferðslan er um at sigla uppá turt.

Hann heldur, at ráðiligt er at brúka fleiri pengar á fíggjarlógini fyri at loysa átrokandi trupulleikar sum teir á Strandferðsluni.

– Vit skulu bara allatíðina hava í huga fullveldisætlanin og at leggja pengar til síðis, men yvirskot á fíggjarlógini er einki mál í sær sjálvum, sigur hann.

Orsøkin til, at pengarnir til fleiri umvælingar, leigu ella keyp av skipi skulu brúkast í útlandinum er, at so nógv ferð er á føroyska búskapinum.

Um fleiri almennir pengar brúktir her í landinum, fer tað at leggja enn størri trýst á arbeiðsmarknaðin og vandin fyri fløskuhálsum – tað er trot á arbeiðsmegi – er stórur.

Hetta hevur Búskaparráðið eisini víst á í nýggjastu frágreiðing síni, sum kom seinasta fríggjadag.

## Leggja til síðis

– Skulu fleiri pengar brúkast til umvælingar av strandferðsluskipunum ella møguliga nýgerð í Føroyum, mugu aðrir partar av fíggjarlógini skerjast, sigur Bjarni Olsen.

Hinvegin er ráðiligt at brúka nakað av pengunum av yvirskotinum, um meirnýtslan fer fram í útlandinum. Roknað verður við einum yvirskoti á fíggjarlógini fyri 1999 upp á fleiri enn 500 milliónir, og væntaða yvirskotið fyri ár 2000 er lítið minni. Tí er talan um eina milliard í yvirskoti upp á tvey ár.

– Í fyrstu atløgu fær tað ongar álvarsligar fylgjur fyri gjaldsjavnan ella yvirskotið, at nakað meira av pengum verða brúktir í útlandinum, men tað ræður alla tíðina um at hava í huga, at pengar skulu leggjast til síðis til at standa ímóti við, um blokkurin minkar, sigur Bjarni Olsen.

– Tað er ein trupulleiki fyri samfelagið, at neyðugt er við almennum íløgum, samstundis sum hákonjokturur er í búskapinum.

Støðan á Strandferðsluni er sambært tekniska leiðaranum har ruðuleikakend. Skip skulu í dokk, avloysaraskip mangla og fleiri av skipunum, sum lítast skulu á, eru í ringum standi.

Í gjár mælti samgongutingmaðurin Sámal Petur í Grund til, at trupulleikarnir á Strandferðsluni verða raðfestir hægri enn yvirskotið á fíggjarlógini, og frá andstøðuni eru somu tónar at hoyra.

# Røntgenverkfrøðingur spælir klaver

*Mangt forvitnisligt er á skránni í Føroyahúsinum í februar*



*Martin Fjallstein, leiðari í Føroyahúsinum*

DAGFINN OLSEN

Skráin í Føroyahúsinum í Keypmannahavn er fjølbroytt í februar.

Um vikuskiftið verður dansur við Teimum av Kamarinum, sum Nærvarpið skipar fyri.



*Sangkvinnan Jensina Olsen roynir seg nú eisini á løriftinum*

Øll tey meira ella minni føstu tiltøkini eru á skránni, sum t.d. føroyskur dansur, kór og ymisk hugnakvøld.

## Synir fólkatingsmannin

Tann 8. februar fara Jákup og Mikkjal Nielsen at syngja og spæla guitar. Eisini verður farið upp á gólv. Jákup og Mikkjal eru synir kenda prestin og fólkatingsmannin Jóhan Nielsen, sála.

Onnur tiltøk eru argentinsk tango, bingo og fernisering.

## Á løriftinum

Jensinu Olsen kenna mong sum songkvinnu. Seinast sum rødd og stigtakara handan fløguna Grísaflísa Pætur.

Tann 15. - 17. februar skipar Listafelagið í Keypmannahavn fyri framsýning við myndum hjá Jensinu, sum nú eisini roynir seg á løriftinum.

## Røntgenverkfrøðingur spælir klaver

Ætlanin var, at Bjarki Olsen tann 25. januar skuldi siga frá. Honum barst frá, men møguliga verður hann á skránni 22. februar.

Bjarki er ættaður av Tvøroyri - Undir Heygnum. Pápin, Jákup Olsen, var varaskúlastjóri. Bjarki er útbúgvin innan strálufysikk og hevur arbeitt sum røntgenverkfrøðingur. Hann hevði í mong ár egið felag og arbeiddi serstakliga í miðystri. Bjarki fer at siga frá hendingum á lívsleiðini og eisini spælir hann klavertónleik.

# Samráðingarnar ganga ikki væl

*Føroya Lærarafelag handaði mánadagin Fíggjarmálastýrinum fráboðan um arbeiðssteðg og blokadu, verður ikki semja áðrenn 1. mars*

DAGFINN OLSEN

Mánadagin sessaðust Føroya Lærarafelag og lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum aftur við samráðingarborðið. Partarnir hava havt nakrar fundir.

Undir samráðingunum í fjør eydnaðist ikki at finna endaliga semju og hótti Føroya Lærarafelag tá við arbeiðssteðgi. Tá varð fyribilssemja gjørd, sum gongur úr 1. mars.

Á fundinum mánadagin handaði Føroya Lærarafelag Fíggjarmálastýrinum fráboðan um arbeiðssteðg og blokadu, verður ikki semja innan 1. mars.

Sambært tíðindatænastu Føroya Lærarafelags ganga samráðingarnar heldir strilti.

Næsti fundur verður mánadagin 7. februar.

# Einar Jóhannesson á vitjan

*Kendur íslendskur klarinettleikari vitjar Konsertfelagið*

Ein av fremstu solistum íslendinga klarinettleikarin Einar Jóhannesson kemur á vitjan higar og fer at hava tvær konsertir í Føroyum saman við Jóhannes Andreasen.

Teir spæla í Trongisvágs skúla hósdagin 3. feb. kl. 20.00 og í Norð-urlandahúsinum leygardagin 5. feb. kl. 16.00.

Skráin er vælvald við einari klarinettperlu fyri og aðrari eftir. Á skránni eru at finna nýskapandi verk sum tað eftir pólendingin Witold Lutoslavski, sum nevnist Dansi forspøl. Fimm stykkir bygt á polskan fólkatónleik og so tað eftir íslendingin Áskell Másson »Blik« fyri soloklarinett frá 1979, har modernaði tekniskar snildir verð anýttar. Sum kontrast til Lutoslawski eru fýra íslendsk tjóðløg í útsetingum eftir fýra ymisk tónaskald.

Tvey av høvuðsverkunum úr klarinettliteraturinum eru eisini við, bæði eftir fronsk tónaskald sonaturnar eftir ávíkavist Francis Poulenc og Camille Saint-Saens. Bæði verkini eru sera vøkur og krevjandi, tó als ikki tung at líða á. Saint-Saens er inniliga romantiskur, meðan Poulenc við sínum nýklassiska tónalagi á ein tølandi hátt førir okkum inn í tað nýggju tíðina í 20-aldar tónleiki.

Leikni virtuositetin goymir Einar til seinast í eini ørum tekniskum meldri av tónum, Fantasi eftir Donato Lovreglio yvir operuna »La Traviata« eftir Giuseppi Verdi.

Einar Jóhannesson helt til London at læra John McCow eftir lokið nám heima í Reykjavík. Á námsárunum á The Royal College of Music vann hann sína fyrstu virðisløn uppkalla eftir navnframa klarinettistinum Frederick Thurston. Seinni eru fleiri virðislønir komnar, sum Menuhin og Sonning virðislønir.

Fyrst í áttati árunum flutti hann aftur til Íslands til at taka við starvinum, sum soloklarinettistur í íslendska symfoniorkestrinum. Harafturat hevur hann verið sera virkin sum solistur, limur í Blásarakvintett Reykjavíkur, Trio Borcalis og fleiri øðrum samhangum. Hann hevur innspælt ein hóp av fløgum og hópin av verkum hava verið komponeraði beinleiðis til hansara.

Enska dáman Pamela Weston hevur skriva tríggjar bøkur um klarinettleikarar alt frá tí at heimildir finnast frá upphavi ljóðførisins í byrjanini av 18. øld.

Í nýggjastu útgávuni sum umhandlar klarinettleikarar frá okkara tíð, telist Einar millum teir fremstu.

Heiðurin og útfordringina at spæla undir hjá Einari hevur okkara maður klaverleikarin Jóhannes Andreasen fingið.

Neyvan kann sigast annað at Einar stólar á kynstur Jóhannesar, tí venjingartíðin teir fáa saman verður stutt. Men soleiðis arbeiða professionellir tónleikarar saman. Jóhannes hevur sína musikalsu bakgrund í Tórshavn, Wien og London.

Lat ikki hesa konsert gleppa tær av hondum. Einar og Jóhannes lata ongan fara órørdan og tómhentan heimaftur.

Norðurlandahúsið skipar soleiðis fyri, at atgongumerkið til konsert við Einar Jóhannesson og við Hanus og Aldubáruni er galdandi til báðar konsertirnar.



*Heiðurin og útfordringina at spæla undir hjá Einari hevur okkara maður klaverleikarin Jóhannes Andreasen fingið.*